| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 12. apríl 2007 |
| Býráðsfundur nr. | 04/2007 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2007 tann 12. apríl kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 04. apríl 2007 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Jann Toftegaard
Dánjal Vang
Signar á Brúnni
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Eyðun á Lakjuni
Tórfríður Abrahamsen
Súanna Gaard
Petur Abrahamsen

Súsanna Gaard møtti sum varalimur fyri Jón Nolsøe Olsen, sum hevði forfall. Jón hevur ikki boðað borgarstjóranum frá hesum, sí annars mannagongd um hesi viðurskifti í skriv til býráðslimirnar, dagfest 04. apríl 2007. Súsanna hevur sjálv tann 11. apríl 2007 vent sær til borgarstjóran um, at Jón hevur heitt á hana um sum varalim at møta sína vegna.

Skrivari: Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 16/2007.**

***Umsókn frá Óla Johannesen um byggiloyvi til aftratbygging upp í sethúsini á matr. nr. 626.***

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Óla Johannesen, dagfest 12. mars 2007 um byggiloyvi til uppíbygning til sethúsini á matr. nr.626 á Karvatoftum 12 sambært viðløgdum tekningum.

Sambært byggisamtyktina standa húsini á einum økitil almennar stovnar, so møguleiki er fyri at taka upp samráðingar við eigaran, um hann er sinnaður at selja kommununi ognina, móti at hann fær annað grundstykki og eitt ávíst endurgjald fyri húsini.

Um hann ikki góðtekur hetta ella semja ikki fæst um endurgjaldið, eigur hetta ikki at verða nøkur forðing fyri, at hann fær byggiloyvi til ætlaðyu bygging.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 27. mars 2007, og heldur nevndin tað verða mest hóskandi, at kommunan ognar sær hetta øki, og mælir til, at samráðingar verða tiknar upp við eigaran um, at kommunan keypir ognina. Føra samráðingarnar ikki til nakað mælir nevndin býráðnum til, at byggiloyvi verður givið til ætlaðu bygging.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 27. mars 2007 og tekur undir við teknisku nevndini um at taka upp samráðingar við eigaran um keyp av ognini á matr. nr. 626 á Karvatoftum 12, grundað á grundstykkið framyvir kann verða skipað sum frílendi, eins og gjørt er aðrastaðni í býnum.

Talan er helst um best egnaða øki í miðbýnum til endamálið, tá hetta er framhald av skipaða lendinum, har gamla Siloa stóð.

Fundir hava verið millum býráðsleiðsluna og eigaran tann 30. mars og 02. apríl 2007, sí hjáløgdu fundarfrásøgnir. Á fundinum tann 02. apríl 2007 gav leiðslan Óla Johannesen eitt tilboð upp á ognina matr. nr. 626 við ástandandi sethúsum, treytað av góðkenning býráðsins útgreinað soleiðis:

1. Kr. 500.000,00 fyri alla ognina.
2. Kr. 440.000,00 fyri alla ognina + kr. 60.000,00 fyri grundstykkið = kr. 500.000,00.

Av fundarfrásøgnini 02. apríl 2007 framgongur, at eigarin kundi hugsa sær at fingið kr. 600.000,00 fyri ognina, men hann kundi ganga við til kr. 560.000,00 útgreinað soleiðis at kr. 500.000,00 varð goldið fyri matr. nr. 626, meðan sonurin skuldi fáa eitt grundstykki frá kommununu, mett kr. 60.000,00 ella tilsamans kr. 560.000,00.

Tó varð niðurstøðan á fundinum tann, at eigarin skuldi hugsa meira um málið og tey tilboð, sum kommunan hevði latið honum skrivliga á fundinum, og skuldi hann telefoniskt venda sær aftur til fyrisitingina skjótast gjørligt.

Eigarin hevur tann 03. apríl 2007 vent sær telefoniskt til býráðsskrivaran og boða frá, at hann heldur fast við søluprísin fyri ognina upp á kr. 500.000,00 + kr. 60.000,00 fyri grundøki frá kommununi til sonin Poul. Hesin hevur verið í ovaru útstykkingini sunnan fyri Bakkageilina og hava hann og konan áhuga í grundstykki nr. 9, um so verður at býráðið samtykti keypstreytirnar.

**Avgerð:**

Atkvøtt varð um tilboðið frá Óla Johannesen upp á kr. 500.000,00 fyri ognina + kr. 60.000,00 fyri grundstykki ella tilsamans kr. 560.000,00. Tilboðið varð samtykt. (7 atkv. fyri og 2 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddu Signar á Brúnni og Tórfríður Abrahamsen. Signar á Brúnni segði seg kunna góðtaka at veita umsøkjaranum byggiloyvi til aftratbygging, um viðkomandi sendi kommununi fullfíggjaðar tekningar av bygging, sum ikki á nakran hátt koma at skemma økið.

**<u>Mál nr. 17/2007.</u>**

**Umsókn frá Poul Joensen um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 211c**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Poul Joensen, dagfest 26. februar 2007 um byggiloyvi til sethús á matr.nr. 211c við Bakkageilina sambært hjáløgdum tekningum.

Grannaloyvi frá Torkili Beder fyriliggur við skrivi, dagfestum 17. januar 2007.

Umsóknin hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 27. mars 2007, og mælir nevndin býráðnum till, at umsóknin verður gingin á møti soleiðis:

1. Treytirnar í Almennu Byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og Kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verða fylgdar.
2. Í hesum sambandi verður víst á at øll búrúm skulu hava minst eitt vindeyga, sum kann latast upp við fríðum opi, sum er minst 50 cm í breeidd og 60cm høgt. Hædd + breidd á tí fría opinum skal vera minst 1,50 m2.
3. Parkeringpláss til 2 bilar skal verða inni á stykkinum, og hetta skal verða gjørt áðrenn flutt verður inn í húsini. Møguligt bilhús verður ikki roknað sum bilstøðil. Veggurin móti vegnum Stovugerði verður gjørdur í samráð við Teknisku Deild.
4. Ø 315 mm reinsibrunnur skal verða settur á báðar kloakkleiðingarnar áðrenn hesir verða veittir út av grundstykkinum. Rottangi skal verða samb. leiðbeining frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og settur niður samb. vegleiðing um rottangauppseting. Eisini skal rundskriv dagf. 2. juli 1998 frá Heilsufrøðiligu Starvsstovu viðv. nýtslu av tilfari til dren verða fylgd. Kloakkpalnur skal góðkennast av teknisku deild og kloakkirnar skulu sýnast og góðkennast av Teknisku Deild, áðrenn tær verða tyrvdar.
5. Húsini skulu verða sett av Teknisku deild.
6. Byggiloyvið er galdandi 2 ár frá útskrivingardegnum

**Avgerð:**

Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**<u>Mál nr. 18/2007.</u>**

**Umsókn frá Thomasi Lambastein umsókn um byggiloyvi til havaskýli.**

Fuglafjarðar kommuna hevur mótikið umsókn frá Thomasi Lambasteini, dagfest 03. februar 2007 um loyvi at byggja havaskýli vestan fyri sethúsini á matr. nr. 143at, soleiðis at ein kann sita fjálgur tey køldu góðu summarkvøldini.

Grannaloyvi fyriliggur frá Kristiani Petersen, dagfest 03. februar 2007.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndi 27. mars 2007, og mælir nevndin býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti samb. innsendar tekningar.

**Avgerð:**

Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**<u>Mál nr. 19/2007.</u>**

**Umsókn frá Ingjald Andreasen um byggiloyvi til úthang á serthúsini matr. nr. 564**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Ingjaldur Andreasen, dagfest 05. mars 2007 um byggiloyvi til úthang á matr. nr. 564 við Skinnstakkin 4 í Fuglafirði.

Við umsóknini er grannaloyvið frá Rólant Johannesen, dagfest 05. mars 2007, og er tekningin send inn við áður innsendari umsókn.

Umsóknin varð tá noktað, tá kommunan var vitandi um at málið um at ómynduggera Manherta Andreasen, ið tá var eigari av grannaognini, var til viðgerðar.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevnd 27. mars 2007, og mælir nevndin býráðnum til, at byggiloyvið verður givið samb. innsenda tekning - skjal nr. 1 og 2.

**Avgerð:**

Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**<u>Mál nr. 20/2007.</u>**

**Uppsøgn av sáttmála um felags aktingarmann við Gøtu og Leirvík.**

Karl Hansen, sum er aktingarmaður hjá kommununi, hevur ynski um at verða loystur úr starvi sum aktingarmaður í Gøtu- og og Leirvíkar kommunum, sum kommunan hevur samstarv við.

Karl vil halda fram, um hann bert hevur Fuglafjørð at taka sær av .

Soleiðis sum vit hava skilt, eru allir partar , bæði kommunur, løgregla og starvsfólk ( t.e. aktingarmaður og býarverkfrøðingurin í Fuglafirði) samd um, at hetta er eitt samarbeiði sum ikki er nøktandi fyri partarnar.

Uppgávurnar sum kommunan hevur at loysa í Fuglafirði eru meira enn nokk, og hevur kommunan tessvegna ikki orku at loysa hesa uppgávu fyri grannabygdirnar eisini.

Hildið verður tí, at hettar eru uppgávu, sum kommunurnar hvør sær kunnu loysa betur.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevnd 27. mars 2007, og mælir nevndin býráðnum til, at siga upp sáttmálan við Gøtu- og Leirvíkar kommunu skjótast gjørligt, og at fara úr gildi í seinasta lagi 01. mei 2007.

**Avgerð:**

Samtykt varð at útseta viðgerðina av hesum máli til seinni fund. Borgarstjórin verður at taka spurningin upp við grannakommunurnar um møguliga setan av felags aktingarmanni vm. (9-0).

**<u>Mál nr. 21/2007.</u>**

***Viðvíkjandi tilboð upp gravimaskinu/ rennigravara til kommununa.***

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið tilboð frá P/F K.J. hydraulik, Kambsdalur, 530 Fuglafjørður, dagfest 27. mars 2007 upp á nýggjari gravimaskinu (rennugravara) til kommununa av merkinum Huddig 1260 upp á kr. 1.773.378,00 + meirvirðisgjald.

Fyri brúktu gravimaskinur er fyritøkan sinnað at taka hesar inn í býti við nýggju fyri ein samlaðan kostnað upp á kr. 195.000,00, útgreinað soleiðis, at latið verður kr. 50.000,00 fyri "BM Volvo 6300 maskinuna árgang 1988" og kr. 145.000,00 fyri "BM Volvo maskinuna árgang 1990".

Haraftrat er tilboð upp á ein mini rennugravara av merkinum JCB-8035 ZTS upp á kr. 295.000,00.

Prísmunurin verður sostatt kr. 1.873.378,00 + okkara partur av meirvirðisgjaldinum 6,25% kr. 117.087,00 ella tilsamans kr. 1.990.465,00.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 27. mars 2007, og mælir nevndin til at selja báðar gravimaskinurnar og keypa eina nýggja maskinu sambært tilboð + eina lítla maskinu.

Samráðingar verða tiknar upp við K.J. Hydraulik um eitt samlað tilboð fyri 2 maskinur + ketur og brekkara.

Mett verður, at samlaða tilboðið kemur at verða umleið kr. 2,0 mió., og heitir nevndin á fíggjarnevndina um at viðgera møguleikan við eini eykajáttan til møguligt keyp av 2 nýggjum maskinum til teknisku deildina.

Eftir fundin hevur tekniska deildin tosað við K.J. hydraulik um viðurskiftini, og vilja teir ganga við til, um keypið verður veruleiki, at lata brekkaran og keturnar ókeypis, virði fyri brekkaran umleið kr. 60.000,00 og keturnar kr. 40.000,00 ella tilsamans umleið kr. 100.000,00.

Í sambandi við fíggjarætlan kommununar fyri 2007, sum góðkend er av býráðnum við 2. viðgerð tann 29. november 2006, so er staðfest, at eingin peningur er avsettur til íløgur í nýggjar gravimaskinur til teknisku deildina.

Tí verður talan um eykajáttan, um keypið skal verða veruleiki. Í hesum sambandi skal verða upplýst, at ein eykajáttan skal hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, og skal greitt ganga fram sambært § 41 stk. 2 Í somu lóg, hvussu eykajáttanin skal verða fíggjað.

Endaliga viðgerðin skal verða kunnað landsstýrismanninum í Innlendismálum í seinasta lagi 3 dagar aftan á samtykt býráðsins við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í kommunustýrislógini.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt tilmæli frá teknsisku nevndini frá 27. mars 2007 og mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum um keyp av nýggjum gravimaskinum til teknisku deildina fyri max. kr. 2,0 mó., og sølu av gomlu maskinunum, og at áheitan um eykajáttan verður løgd fyri býráðið upp á nevndu upphædd verður løgd fyri býráðið á fundinum 12. apríl 2007 til 1. viðgerð.

Nevndin mælir somuleiðis býráðnum til, at eykajáttanin upp á max. kr. 2,0 mió. verður fíggjað við lántøku.

**Avgerð:**

Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. Málið um eykajáttan til keypið varð beind til 2. og endaliga viðgerð á býráðsfundinum 26. apríl 2007. (7 atkv. fyri og 2 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddu Signar á Brúnni og Tórfríður Abrahamsen).

**<u>Mál nr. 22/2007.</u>**

**Skriv frá Grunninum Karvatoftir um viðtøkubroytingar.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Grunninum Karvatoftir, dagfest 02. desember 2006 saman við uppskoti til viðtøkubroytingar, sum sambært grein 8 í galdandi viðtøkum bert kunnu verða broyttar av Fuglafjarðar býráð og Fornminnisfelagnum.

Talan er um broytingar av grein 2, 3,4 og 9 í viðtøkunum, sum samtyktar vórðu á stovnandi fundi tann 11. september 1993. Viðtøkubroytingarnar eru samtyktar av nevndini tann 27. november 2006.

Mentamálanevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 17. januar 2007 og varð samtykt at útseta endaligu viðgerðina av hesum máli til seinni fund, somuleiðis sum heitt verður á býráðsskrivaran um at kanna kommunalu viðgerðina av upprunaviðtøkunum frá 11. september 1993.

Nevndin hevur móttikið notat frá býráðsskrivaranum, dagfest 20. februar 2007, har sagt verður frá, at sambært journaliina framgongur, at býráðið ikki hevur viðgjørt málið um uppruna viðtøkurnar fyri Grunnin Karvatoftir, sum samtyktar vórðu á stovnandi fundi tann 11. september 1993.

Fyrisitingin hevur tó ábendingar um, at táverandi býraðsformaður helst hevur verið á stovnandi fundinum umboðandi kommununa, men hvørja støðu hann kommununar vegna hevði á fundinum er av góðum grundum ógreitt, tá viðkomandi ikki longur er okkara millum, og einki skrivligt finst um hetta mál.

Annars hevur kommunan beint eftir stovnandi fundin móttikið “Viðtøkurnar fyri grunnin Karvatoftir”, sum nevndarlimirnir eisini hava fingið avrit av.

Mentamálanevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 26. januar 2007, og mælir nevndin býráðnum til ikki at taka undir við uppskotinum til broytingarnar fyri Grunnin Karvatoftir, sum skotið er upp av nevndini fyri grunnin, við teirri grundgeving, at býráðið ikki formliga hevur góðtikið upprunaviðtøkurnar fyri henda frá 11. september 1993, og tessvegna ikki metir seg sum part í málinum, í hesum føri viðgerð av grein 8.

Sambært uppruna viðtøkunum fyri grunnin er kommunan beinleiðis nevnd í grein 2, har savnið seinast um 8 ár skal handast stovni, tilnevndur av Fuglafjarðar býráð og Fornminnisfelagnum.. Í grein 8 kunnu viðtøkur bert verða broyttar við góðkenning av Fuglafjarðar býráð og Fornminnisfelagnum og sambært grein 9 um avtøku, skal góðkenning verða fingin til vega frá Fuglafjarðar býráð og Fornminnisfelagnum, hvat gerast skal við ognir grunnsins.

Annars skal nevndin upplýsa býráðnum, at seinast í nítiárunum heitti grunnurin á býráðið um at tilnevna ein lim í nevndina, men hesi áheitan tók býráðið ikki av og samtykti ongan lim at velja í nevndina.

**Avgerð:**

Tilmæli frá mentamálanevndini varð samtykt. (9-0).

**<u>Mál nr. 23/2007.</u>**

**Umsókn frá Jón Nolsøe Olsen um at sleppa frá sum limur í Hallarnevndini.**

Fuglafjarðar býráð hevur móttikið umsókn frá Jón Nolsøe Olsen, dagfest02. mars 2007, har heitt verður á býráðið um at sleppa frá sum nevndarlimur í Hallarnevndini sum skjótast.

Viðkomandi er valdur í Hallarnevndini í sambandi við skipan av býráðnum tann 30. november 2004 fyri valskeiðið 01. januar 2005 til 31. desember 2008, og fyri at sleppa úr nevndini krevst, at býráðið samtykkir hetta, og at nýggjur limur verður valdur ístaðin. Hesin skal sambært § 3, stk. 1 í sáttmálanum millum Fuglafjarðar-, Leirvíkar- og Gøtu kommunur um Ítróttar- og samkomuhøllina á Kambsdali verða kommunustýrislimur.

Vísandi til § 3, stk. 2 skal ein eykalimur verða valdur fyri hvønn nevndarlimin sær, men hetta er ikki gjørt á skipanarfundinum 30. november 2004 fyri valskeiðið 01. januar 2005 til 31. desember 2008, og tí er neyðugt at fáa hesi viðurskifrti í rættlag.

Sambært § 3, stk. 1 kann ein varalimur fyri borgarstjórarnar bert verða tann til eina og hvørja tíð valdi varaborgarstjóri, meðan ein kommunustýrislimur skal verða varalimur fyri kommunustýrislimin, sum valdur er saman við borgarstjóranum í Hallarnevndina.

**Avgerð:**

Samtykt varð at velja Dánjal Vang sum lim í Hallarnevndini restina av inniverandi valskeiði, somuleiðis sum samtykt varð at velja Jann Toftegaard sum varalim í nevndina fyri Sigurð S. Simonsen og Eyðun á Lakjuni fyri Dánjal Vang. (9-0).

**<u>Mál nr. 24/2007.</u>**

***Viðvíkjandi vali av limi í nevndina fyri uttanumøki skúlans.***

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Skúlastýrinum, dagfest 21. februar 2007, har stýrið á fundi tann 20. februar 2007 hevur umrøtt uttanumøki skúlans – skúlagarðin.

Umboðið hjá skúlastýrinum í nevndini, sum eisini hevur verið formaður, hevur borið seg undan at halda fram í nevndini. Stýrið er av teirri sannføring, at nevndararbeiðið hevur verið sera tungt, grundað á, at alt ov nógvir limir hava verið í nevndini, og metir stýrið, at munandi meira hevði komið burturúr, um nevndin hevur 3-5 limir.

Skúlastýrið mælir til, at nevndin verður vald av nýggjum við hesum umboðum:

1 umboð fyri kommununa
1 umboð fyri skúlastýrið
1 umboð fyri skúlaleiðsluna
1 umboð fyri lærararnar
1 umboð fyri næmingarnar
*+ 1 skrivara frá kommununi.*

Mentamálanevndin hevur viðgjørt skrivið frá Skúlastýrinum á fundum 26. og 28. februar 2007 og varð semja um, at mæla býráðnum til at velja nevndina av nýggjum, sum skotið er upp av skúlastýrinum.

Tá talan er um eina nevnd, sum vald verður sambært § 36, stk. 1 í kommunulógini og § 9, 1. petti í kommunuststýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommuna, so er tað býráðið sum í hesum føri eftir tilmæli frá mentamálanevndini tilnevnir allar limirnar í nevndini.

Tí hevur nevndin við skrivi, dagfestum 02. mars 2007 heitt á Skúlastýrið og Fuglafjarðar skúla um at tilmæla sínar limir í nevndina yvir fyri mentamálanevndini í seinasta lagi *16. mars 2007*, og boða nevndini skrivliga frá hesum.

Við skrivi frá Fuglafjarðar skúla, dagfest 16. mars 2007 verður mælt til at velja niðanfyri standandi í nevndina:

- Fyri skúlaleiðsluna: Súni í Hjøllum
- Fyri lærararnar: Jastrid á Dalbø
- Fyri næmingararnar: Uni Reinert Petersen

Skúlastýrið boðað frá í skrivi, dagfestum 27. mars 2007 at nevndin á fundi tann 20. mars h.á. er samd um at mæla til, at Sonja á Líðarenda, 512 Norðragøta verður teirra limur í nevndini.

Mentamálanevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 27. mars 2007 og mælir einmælt býráðnum til at velja tilmæltu limirnar í nevndina fyri uttanumøki skúlans, somuleiðis sum nevndin eisini einmælt er samd um at velja Signar á Búnni sum kommununar lim í nevndina.

Annars skal verða upplýst, at nevndarlimur í mentamálanevndini hevur spurt Jón Nolsøe Olsen, sum annars hevur verið annar av limum kommununar í fráfarandi nevnd, um hann hevur áhuga í at halda fram sum limur valdur av kommununi. Hann hevur boðað frá, at hann ikki hevur áhuga í at halda áfram, og tí mælir nevndin til at velja annan ístaðin.

**Avgerð:**

Tilmælið frá mentamálanevndini varð samtykt. (9-0).

**<u>Mál nr. 25/2007.</u>**

**Viðvíkjandi uppskoti til val av bygginevnd í sambandi við Fuglafjarðar skúla.**

Vísandi til § 36, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri mælir ein meiriluti í mentamálanevndin Dánjal Vang og Jann Tofetgaard á fundi 26. februar 2007 býráðnum til at velja eina serstaka bygginevnd til at taka sær av arbeiðinum við at hava eftirlit við um- og útbygging av Fuglafjarðar skúla.

*Í hesum sambandi mælir nevndin til, at hesir limir verða valdir í nevndina:*

- Pætur Joensen, býarverkfrøðing
- Dánjal Vang, formann í mentamálanevndini
- Súni í Hjøllum, skúlastjóra
- Ann Mari Hentze sum skrivara

Nevndin skipar nevndin seg sjálv eftir kommunustýrisskipanini fyri kommununa eftir sama leisti, sum gjørt verður í sambandi við skipan av teimum føstu kommunalu nevndunum.

Sambært § 36, stk. 1 í kommunustýrislógini og § 9, 1. petti í kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu kann kommunustýri seta serstakar nevndir at taka sær av einstøkum málum ella at ráðgeva kommunustýrinum, fíggjarnevnd ella aðrari nevnd, í hesum føri mentamálanevndini.

Kommunustýrið (Mentamálanevndin) ásetir nærri reglur bæði um virksemi, virkisskeið og manning av serstøkum, ráðgevandi nevndum. Ætlanin í hesum føri er, at talan verður um eina nevnd, sum beinleiðis kemur at átaka sær nevndararbeiðið vm. við um- og útbyggingum av Fuglafjarðar skúla í tøttum samarbeiði við avvarðandi nevndir og kommunustýri.

Ein minniluti Signar á Brúnni tekur ikki undir við meirilutauppskotinum og mælir býráðnum frá at samtykkja hetta, grundað á at hetta kann verða við til at skapa fyridømi.

**Avgerð:**

Atkvøtt varð fyrst um minnilutatilmælið. Hetta fall. (2 atkv. fyri og 7 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddu Sigurð S. Simonsen, Jann Toftegaard, Dánjal Vang, Eliswabeth D. Eldevig, Eyðun á Lakjuni, Petur Abrahamsen og Súsanna Gaard.

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmælið. Hetta varð samtykt. (6 atkv. fyri, 2 atkv. ímóti og 1 atkv. blonk. Ímóti atkvøddu Signar á Brúnni og Tórfríður Abrahamsen, meðan Petur Abrahamsen atkvøddi blankt).

**<u>Mál nr. 26/2007.</u>**

**Viðvíkjandi uppskoti til val av nevnd í sambandi við Fuglafjarðar søgu.**

Vísandi til § 36, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri mælir mentamálanevndin á fundi 26. februar 2007 býráðnum til at velja eina serstaka nevnd til at taka sær av arbeiðinum við at skriva Fuglafjarðar søgu, hetta sambært avsetingar býráðsins av kr. 75.000,00 á fíggjarætlanini fyri 2007.

*Í hesum sambandi mælir nevndin til, at hesir limir verða valdir í nevndina:*

- Arne Nørrevang

- Freydis Poulsen
- Ditlev Róin
- Petur Martin Petersen

Nevndin skipar nevndin seg sjálv eftir kommunustýrisskipanini fyri kommununa eftir sama leisti, sum gjørt verður í sambandi við skipan av teimum føstu kommunalu nevndunum.

Sambært § 36, stk. 1 í kommunustýrislógini og § 9, 1. petti í kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu kann kommunustýri seta serstakar nevndir at taka sær av einstøkum málum ella at ráðgeva kommunustýrinum, fíggjarnevnd ella aðrari nevnd, í hesum føri mentamálanevndini.

Kommunustýrið (Mentamálanevndin) ásetir nærri reglur bæði um virksemi, virkisskeið og manning av serstøkum, ráðgevandi nevndum. Ætlanin í hesum føri er, at talan verður um eina nevnd, sum beinleiðis kemur at átaka sær nevndararbeiðið vm. við at skriva Fuglafjarðar søgu í tøttum samarbeiði við avvarðandi nevndir og kommunustýri.

**Avgerð:**

Tilmælið frá mentamálanevndini varð samtykt. (8 atkv. fyri og 1 atkv. blonk. Blankt atkvøddi Elisabeth D. Eldevig).

**Mál nr. 27/2007.**

***Viðvíkjandi leigusáttmála millum kommununa og P/F Højgaards handilsvirki.***

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá P/F Højgaards handilsvirki, dagfest 05. mars 2007, har søkt verður um at fáa longt leigusáttmálan við kommununa fyri kjallaran í bygninginum á matr. nr. 671b í Fuglafirði við trimum árum.

Verandi leigusáttmáli, sum undirskrivaður varð partanna millum tann 01. desember 2004 er sambært § 3 óuppsigiligur í 5 ár til 30. november 2009, og sostatt verður ynskt, at hesin verður longdur fram til 30. november 2012.

Sambært fundarfrásøgn millum umboð fyri kommununa og P/F Højgaards handilsvirki tann 05. mars 2007 verða viðurskiftini í sambandi við m.a. § 5, stk. 3 umrødd, hetta eru gjøld fyri rindan av hita og eli. Eftir fyriliggjandi hevur P/F Højgaards handilsvirki nú fingið sjálvstøðugan ketil og oljufyr í niðara bygninginum, somuleiðis sum miðað verður fram ímóti at fáa viðurskiftini viðvíkjandi elinum upp á pláss.

Sum støðan er ídag rindar verandi leigari av Piddasahandli/Riberhúsi, sum er Fuglafjarðar heimavirki oljuna, meðan P/F Højgaards handilsvirki stendur fyri el-máraranum í Piddasahandli og rindar elrokningarnar.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini tann 27. mars 2007, og mælir nevndin býráðnum til at strika § 5, stk. 3 í leigusáttmálanum, meðan nevndin mælir staðiliga býráðnum frá at broyta leigumálið sambært § 3 við trimum árum.
Grundgevingin fyri hesum er, at áskoðanin altíð hevur verið og framvegis er, at Fuglafjarðar fornminnisfelag so skjótt sum til ber, eftir at leigumálið er farið úr gildi, skal fáa innivist fyri sínum lutum í kjallaranum í Piddasahandli/Riberhúsi.

**Avgerð:**

Tilmælið frá mentamálanevndini varð samtykt. (8-0. Blankt atkvøddi Petur Abrahamsen).

**Mál nr. 28/2007.**

***Umsókn frá Vónbjørt Linjonsdóttir um farloyvi í 2 ár.***

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Vónbjørt Linjonsdóttir, dagfest 22. februar 2007 um farloyvi frá arbeiði sínum sum bókavørður á Fuglafjarðar bókasavni í 2 ár, vegna tess, at hon hevur í hyggju at leita sær víðari útbúgving í anmørk í 2 ár. Útbúgvingin, talan er um, er ein yvirbygningsútbúgving á Syddansk Universiteti í Odense innan mentan og formidling.

Hetta er ein útbúgving, sum gevur hollar førleikar at menna seg innan formidling av mentanarligur virksemi, so sum bókasavnsformidking, og taka nógvir bókavørðar júst hesa útbúgving. Hon greiðir frá, at hetta kann koma henni stórliga tilgóðar, um hon vendir aftur til sítt núverandi starv við hesi barlast.

Søkt verður um farloyvi frá 01. august 2007 til 01. august 2009.

Umsóknin hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini tann 28. februar 2007 og mælir nevndin fíggjarnevndini/býráðnum til, at umsóknin frá Vónbjørt Linjonsdóttir um farloyvi í 2 ár frá 01. august 2007 til 01. august 2009 verður gingin á møti, vísandi til § 11 í sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Tó verður mælt til, at farloyvi verður játtað sum tænastufrí uttan løn, tá ið tað ikki stríðir móti kommunalum áhugamálum.

Nevndin mælir somuleiðis til, at kommunan alment søkir eftir bókavørði í farloyvistíðini.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 27. mars 2007 og mælir nevndin býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá mentamálanevndini frá 05. mars 2007.

**Avgerð:**

Tilmælini frá fíggjarnevndini og mentamálanevndini vórðu samtykt við tí broyting, at farloyvistíðin eftir áheitan frá Vónbjørt Linjohnsdóttir verður frá 01. september 2007 til 01. august 2009. (8 atkv. fyri og 1 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddi Tórfríður Abrahamsen).

**<u>Mál nr. 29/2007.</u>**

**Viðvíkjandi ársaðalfundi í I.R.F.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Interkommunala Renovatiónsfelagsskapinum I.R.F., dagfest mars 2007 um innkallan til ársaðalfund á Hotel Hafnia hósdagin tann 03. mei 2007 kl. 10.30.

Sambært avgerð býráðsins er einki umboð valt at umboða kommununa, og stendur tað øllum býráðslimum frítt at møta, men treytin er, at teir eru skrasettir í fulltrúarváttan, sum send verður IRF væl áðrenn aðalfundin.

**Avgerð:**

Málið varð kunnað býráðslimunum, sum annars komu at fáa skriv frá fyrisitingini um møguliga tilmeldan til aðalfundin. Sambært viðtøkum býráðsins kunnu allir býráðslimir møta á aðalfundinum hjá felagsskapinum.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.50.

Jann Toftegaard

Dánjal vang

Signar á Brúnni

Elisabeth D. Eldevig

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Súsanna Gaard

Tórfríður Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen